# Bygdarráðsfundur

## Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 24.03.2025 kl. 17.00

| | |
|---|---|
| Á fundi: | Janus Thomsen |
| | Poul Laust Christiansen |
| | Rakul Mørk |
| | Jóhannes Liasson Rasmussen |
| | Thorstein Thomsen (fyri Otto West) |
| Ikki møtt: | Otto West |
| | Ronni Hammer |
| | Jónfinn L. Poulsen |
| | |
| Skrivari: | Johanna B. Djurhuus |

1. **<u>102-17-2025: Umsókn um byggiloyvi/umbygging á Bíargarði 18, Hvalba</u>.**

   Søkt verður um byggiloyvi til umbygging av bygninginum á Bíargarði 18, Hvalba.

   **Tekniska nevnd 23.03.2025:**

   Nevndin mælir til, at byggiloyvi verður givið.

   **Avgerð:**

   Samtykt varð einmælt at beina málið aftur í Teknisku nevnd fyri at fáa greiðu á undirlendinum og taka ein fund við umsøkjararnar hesum viðvíkjandi. Umsóknin skal eisini sendast friðingarnevndunum til viðgerðar.

2. **<u>102-16-2025: Nýggj tekja v.m. á Gamla skúla</u>.**

   Í sambandi við ætlan at skifta tekjuna á Gamla skúla í ár, hevur Ørvur Norðberg gjørt eina kostnaðarmeting av arbeiðinum.

   | | |
   |---|---|
   | Alutekja – arbeiðsløn, tilfar v.m. | kr. 303.483,90 |
   | Flagtekja – arbeiðsløn, tilfar v.m. | kr. 365.650,20 |
   | Sikatekja – arbeiðsløn, tilfar v.m. | kr. 308.000,00 |

   Í øllum trimum førum skulu kr. 10.000,00 leggjast aftrat fyri uppsetan av skorsteini.

   **Trivnaðarnevndin 21.03.2025:**

   Nevndin mælir til at leggja sikatekju á bygningin.

   **Tekniska nevnd 23.03.2025:**

   Nevndin mælir til antin at leggja sika dúk ella grøna alutekju á.

   **Fíggjarnevndin 24.03.2025:**

   Samtykt varð einmælt at mæla til at leggja sikatekju á og fáa arbeiðið gjørt sambært kostnaðarmetingini.

**Avgerð:**
Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælunum hjá nevndunum og leggja sikatekju á bygningin. Haraftrat varð samtykt at taka loftið niður fyri at síggja, hvørjum standi stórviðurin er í.

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 17.50

Janus Thomsen Poul Laust Christiansen Rakul Mørk

Jóhannes Liasson Rasmussen Thorstein Thomsen